á Eystfirðunum, har føroyingar bæði hittu tey, ið búðu og arbeiddu har, og har teir hittu íslendskar ferðamenn.

Tá ið bilarnir gjørdust fleiri, fóru íslendingar at gera vegir kring landið. Tá var tað, at Egilstaðir gjørdust samferðsluligt knútapunkt. Her komu teir av smáplássunum og bóndagørðunum at keypa, og her vórðu almennu tænasturnar lagdar. At plássið so at siga alt sum tað er neyvan hevur rokkið pensiónsaldri, minnir ikki sørt um Milton Keynes, eingilska býin, sum varð bygdur av nýggjum, tá ið kríggið var liðugt, og so mangt annað í Onglandi lá í skeljasorði.

Føroyingar kóka kleynur til jóla, og tað ger kleynurnar forkunnugar. Hóast tað er hásummar, so eru kleynir tað mest upplagda aftur við einum drekkamunni alla staðni, har vit vitja. Í krambúðini á Egilstøðum eru tær, sum tær eru tað alla aðra staðni kring landið. Nógv størri og trivaligari, enn tær eru, sum verða kókaðar í føroyskum heimum.

Í Reykjavík eru tey heimsborgarar. At nýggja tíðin eisini er nádd longri eystur í landinum sæst eitt nú á matarsiðunum, sum fyri ferðamanninum kennast lítið íslendskir. Á middegi koma handverkarar í stórum tali í krambúðina og keypa plastpakkaðar sandwich ella tvíflísar, og onkrir fáa sær rættir, sum skulu rørast í kókaðum vatni, og so er talan um døgurða.

Meðan vit drekka kaffi, eta kleynur og kanna kortið, koma og fara íslendingar, og tað eru fleiri fremmand enn vit bæði. Ferðavinnan er týdningarmikil partur av lívsgrundarlagnum her á Egilsstøðum.

Í 2003 steðgaðu vit eina løtu á Egilsstøðum. Á veg heim úr Molde saman við ferðalagi úr Klaksvík, eydnaðist ikki at lenda í Vágum, og so varð steðgað lítla løtu á flogvøllinum á Egilsstøðum. Undir krígnum varð fyrsti grasflogvøllurin gjørdur. Fyrst í fimmti árunum varð grúsflogvøllur gjørdur, og síðani hevur verið regluligt flogsamband til Reykjavíkar. Í 1993 varð flogvøllurin víðkaður og rættuliga væl umvældur, og umframt í sambandi við innanlands ferðslu verður nú eisini flogið til Keypmannahavnar.



*Egilsstaðir er miðdepil á Eysturlandinum*

Í Íslandi er tosið tað sama, sum tað er her hjá okkum, tá ið tað ræður um kommunur og kommunusamanleggingar. Alla halgannadag í 2004 fusioneraðu fleiri kommunur her á leið í Fljótsdalshérað, sum hevur 3.500 íbúgvar ella umleið sama talið, sum býr í Runavíkar kommunu, eftir at Skála, Oyndarfjørður og Elduvíkar kommunur eru lagstar afturat. Víddin er velduga stór – tann størsta í einari kommunu í Íslandi – úr Biskupshálsi í vestri, til Héraðsfló í norði, til fjøllini, sum eru kring firðirnar á Miðeysturlandinum, um tað ber til at siga tað soleiðis, í eystri og suður til Vatnajökul og Öxi. Høvuðsbygdirnar eru Egilstaðir og Fallabær, har tað tilsaman búgva umleið 2000 fólk.

## Fyrsta ferðin

Fyrsta ferðin á Egilsstøðum var í 1977 ella fyri knappliga 29 árum síðani. Tað var á veg til og aftur frá barnalegustaðnum við Ástjørn á Norðurlandinum, har so mangir føroyingar hava hjálpt til. Tá ið vit vóru á veg til hús aftur leygardagin 9. juli í 1977, hittu vit nakrar klaksvíkingar á Egilstøðum. Millum teirra var Victor Dánjalsson. Hetta var fyrsta ferðin hjá honum í Íslandi. Teir vóru á veg yvir til Ástjarnar. Síðani hevur Victor verið har yviri so at siga á hvørjum ári. Tað verður vent aftur til seinni.

Nú meðan vit sita á Egilsstøðum, dettur fram í hugan, tá ið Victor í 1977 segði frá, hvussu tað gekk fyri seg, tá ið hann henda dagin fyri fyrstu ferð hevði heilsað upp á tollararnar á Seyðisfjørðinum. Teir høvdu kannað hann og hinar í ferðalagnum so sera gjølla. Umhugsnir, sum hann og hinir høvdu verið, so høvdu teir tikið nógva útgerð við í bussin úr Føroyum. Tollararnir høvdu lagt til merkis nógvar smáar eskjur. Í eskjunum var staniolpakningur. Honum og ikki minst myrklitta og kompakta innihaldinum vístu myndugleikararnir serligan áhuga. Rúsevnir vóru ikki so kend fyri smáum tríati árum síðani, sum tey eru tað í dag. Ikki í Føroyum og neyvan heldur á Eysturlandinum í Íslandi.

Tollararnir kannaðu og snaraðu blanka pakninginum, og tað kundi sæð út sum um, at teir høvdu illgruna um, at innihaldið kanska var vandamikið og kundi umsetast til fitt av pengi. Soleiðis hingu tingini kortini ikki saman. Talan var um sjokulátapálegg! Tað kendu tollararnir ikki, tí um hetta mundið var hesin viðskerðin ikki komin til Seyðisfjarðar.

Síðani hava Victor og so mong saman við honum ofta ferðast umvegis Seyðisfjørðin. Oftast hava tey havt stúgvandi fullan buss av amboðum og útgerð, men teir hava ongantíð aftur verið so gjølla kannaðir av tollaranum, sum føroyingarnir, ið plaga at vera á veg til Ástjørnar, so at siga eru vornir vinir og dus við.

Tíðin flýgur avstað. Tað kennist so stutt síðani hesa tá spillfesku frásøgnina her á Egilsstøðum. Tá ið kortið er kannað, verður kós sett norður móti Langanesi og firðunum, flógvunum og bygdunum og sveytunum, sum tey, ið gingu undan okkum, so ofta tosaðu um.

## Fylgissveinurin

Túrurin kring Ísland í bili er umleið 1350 kilometrar. Av Egilstøðum og suðuryvir og til Reykjavíkar siga talvurnar, at tað eru 698 kilometrar, og av Egilstøðum og norðuryvir og til Reykjavíkar er teinurin 654 kilometrar.

Íslendingar tosa um ringvegin, sum var liðugur í 1974 ella árið fyri, at bilferjusamband kom millum Føroyar og Seyðisfjørðin. Ringvegurin fer ígjøgnum ella í nánd av sjey býum og plássum. Um ferðast verður av Egilsstøðum og ímóti klokkuni, sum tað plagar at verða tikið til, so eru býirnir Akureyri, Blönduós, Borgarnes, Reykjavík, Selfoss og Höfn.

Millum íslendingar hevur tað verið og er tað populert at koyra kring landið, og at nógvir útlendingar gera henda túrin, var sjón fyri søgn síðsta summar. Fyrstu árini eftir at Smyril fyri meiri enn 30 árum síðani fór at sigla yvir á Seyðisfjørðin, vóru tað fleiri føroyingar, sum koyrdu kring landið. Tað man vera frá tí tíðini, at søgan stavar frá, at íslendsku landsvegirnir eru so serliga vánaligir. Tað vóru teir í fleiri støðum tá í tíðini, men soleiðis er tað ikki longur.

Okkara ferð veik eitt sindur frá ringvegnum, tí vit vitjaðu á Langanes leiðini, og kósin er henda vegin, nú fyrsti partur av hesum hugleiðingum er liðugur.

Edvard í Svónoy, skyldmaðurin, sáli, skrivaði endurminningar, sum Zacharias Zachariassen legði til rættis, og sum forlagið Leirkerið gav út í 1989. Edvard nevndi bókina Minniligar hendingar. Ikki so lítil partur av bókini snýr seg um tey 21 árini, tá ið Edvard var bestimaður hjá svágrinum, Símuni hjá Póli, sum førdi Polo, ið hann átti saman við Kjølbro. Lýsingin hjá Edvardi um fiskiskap á Suðurlandinum og Eysturlandinum og kring Ísland er søgan um, hvussu skipsfiskiskapurin gekk fyri seg summarhálvárið hjá flestu føroyingum í tíðini millum bæði kríggini og fram til eftir 2. heimsbardaga. Bókin hjá Edvardi er við í viðførinum, og hon verður nýtt sum kumpass.